# E - og tónleikurin



**Jens Tummas Næss, tónleikari**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
– Ja, blokkfloytu og guitar. Eina tíð var eisini eitt klaver.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
– El-bass. Annars klimpri eg upp á guitar og klaver.

*Syngur tú undir brúsuni?*
– Ja, um eingin annar er í húsinum.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
– Ja, hvønn dag.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
– Bert mín eksistens.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
– 450-500 stk.

*Hvat er tín yndisfløga?*
– »Moving Pictures« hjá Rush.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
– Eina ella aðra »lær teg at jodla her og nú«-fløgu...

*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
– Veit ikki um hann eitur so, men »Ingen regning« hjá Peter Belli - syndarligur.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
– »Break Dance & Electric Boogie« – ein pláta við blandaðum tónleiki frá fyrst í 80'unum. Men eg haldi/vóni, eg havi koyrt hana vekk.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
– »Born To Be Wild« við Steppenwolf.

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
– Donsku Moonjam eru ikki kimsa at til eitt slíkt kvøld.

*Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?*
– Ongan...um eg havi spælt leyagrkvøldið. Annars er tað líka mikið...

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
– Death metal og stílarnir, ið tengja upp at hesum stíli.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
– »Remember Me« hjá Journey.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
– »Skiparin lítli«, ið Jógvan Telling spældi og sang so væl.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
– »Remain Forever«, Bólkurin Ikaroz, sum eg var við í, spældi sangin inn.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
– Tjaaa...hatta var ein verri ein. Møguliga »Be Still My Soul«, sum er ein enskur sálmur.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
– Pink Floyd í Parkini. Rolling Stones vóru eisini forbi góðir

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
– Jaco Pastorius, Sting, Andy Summers, Stewart Copeland, Jimi Hendrix, Mozart, Beethoven, Bach, Beatlarnar, Roger Waters, Johnny Cash, Dylan, Hank Williams, Bird, NHØP, Miles Davis, Susi & Leo...øhh nei, Geddy Lee, Alex Leifson, Neal Peart, Will Lee, Elton John, Eric Clapton, Jeff Beck.......og nógvar afturat.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Jógvan Hugo Gardar, Oslo, hugoga@online.no, jogvan.gardar@c2i.net
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## Fýra á fríggjadagsferð

Tað er fríggjadagur. Seinnapartur. Eg siti í bilinum eins og túsundtals onnur bæði framman fyri og aftanfyri meg. Her havi eg nú staðið í meir enn ein hálvan tíma saman við øllum hinum. Og fleiri skulu koma í somu støðu seinni í dag og allar aðrar gerandisdagar framyvir.

Vit eru stødd miðskeiðis í Lierbakken — á motorvegnum vestanfyri Oslo.

Og her skal eg standa í minst ein hálvan tíma afturat.

Við mær í bilinum havi eg konu og synirnar báðar. Vit kenna, at svongdin nærkast, men sleppa ongan veg. Vit mugu bara bíða eins og øll onnur.

Sum alltíð so royna vit at koma okkum sum skjótast út úr býnum tá vit skulu vitja ommuna og abban í Telemark. Bilurin bleiv pakkaður og gjørdur klárur ígjár. Vit hava havt stuttan arbeiðsdag, og vóru eftir synunum í skúlanum og barnagarðinum so skjótt til bar.

Men soleiðis hava ivaleyst øll onnur eisini hugsað.

Tá vit komu út á høvuðsvegin í Oslo vóru bilar at síggja so langt eygað sær í báðar ættir.

Hóast skelti loyvdu okkum at koyra 80 var ferðin neyvan meir enn 8 kilometrar um tíman.

Og hóast ferðin stundum er komin uppí mest loyvdu ferð 80-90 km/t, so standa vit pinnastill og bíða nú. Her er bert ein ber ong har korn vaks í summar og ein bensinstøð — og so teir bíðandi bilarnir. Brádliga fái eg eyga á eitt skelti - vegmyndugleikarnir hava broytt mest loyvdu ferð akkurát her. Fyri fyrstu ferð síðani vit fóru úr Oslo, so er loyvt at koyra 100 kilometrar um tíman. Hetta má vera fyri at arga, tí um vit koma 100 metrar fram uppá ein tíma, so skulu vit vera glað.

Í Oslo er ferðsluproppar gerandiskostur. Men her úti í Lier og í Drammen er tað verri enn nakrastaðni.

Synirnir eru vorðnir troyttir av at sita stillir. Tann minsti sum hevur sovið eina løtu er nú vakin og vil gjarna út at spæla. Vit royna at práta við teir. Í øðrum bilum síggja vit, at tað prutlar undir lokinum hjá meir enn einum bilstjóra. Bíðitíðin er drepandi keðilig.

Orsøkin til, at vit ikki koma skjótari fram er tann einfalda at her hava skriviborðsfólkini í Statens Vegvesen gjørt tað sum gerast kann fyri at øsa bilstjórarnar. Á veg oman eftir tí langa Lier-bakkanum so steðgar ferðslan heilt upp. Og við snigilsferð gongur ferðin víðari. Fyri umleið tveimum árum síðani læt ein nýggjur tunnil upp á sunnara armi av Drammens-ánni. Nú skulu øll fylgja einari breyt yvirum Drammensánna. Eingin ferðsla skal inn í Drammen. Øll skuldu gerast glað.

Men millum tilrættaleggjararnar so var tað ein sum ikki hevði tikið alt við í roknistykkið. Hann hevði gloymt, at brúgvin bert hevur eina breyt. Og inn á hesa breytina skulu vit, sum hava ligið á motorvegnum við trimum breytum kroystast.

Og her standa vit so fitt. Bíðandi bilar í túsundatali.

Og eg kann bara sita og hugsa. Eg kann hugsa um allar bilarnar, ella eg kann hugsa um at bert stutta tíð eftir at vit einaferð eru komin yvirum Drammensánna, so hava vegmyndugleikarnir aftur verið uppá spæl.

Tey hava lagt ein veg við fýra breytum móti Kongsberg. Hesin skal fáa ferðsluna skjótari fram. Men hví hesin vegurin endar inni ímillum vanlig sethús er ikki gott at siga. Áðrenn ein veit av, er mest loyvda fer sett niður til 40 km/t og ferðsluforðingarnar í vegnum koma við 50 metra millumbili — so óhugsandi er at øka ferðina uppum teir 40 km/t. Á tí gamla vegnum sum lá uttanfyri Kongsberg bar til at koyra 80 km/t. Men nú meina tey, at betri er at senda okkum ígjøgnum Kongsberg, samstundis sum tey í Drammen hava gjørt beint øvugt. Har skal ferðslan leggjast uttan um býin.

Hugsa tær. Í báðum førum merkir hetta, at túrarnir hjá teimum koyrandi gerast longri?

Tá vit so eru komin ígjøgnum Kongsberg, so kunnu vit gleða okkum til, at mest loyvda ferð er 30-70 km/t restina av túrinum. Tí tá eru vit komin so langt út á landið, at vegirnir eru smalir og nógv sving eru.

Tá vit so endiliga eru frammi, so hava vit brúkt millum tríggjar og fýra tímar uppá ein tein, sum ikki skuldi tikið meir enn í yvirkant av tveimum tímum.

Eg veit væl, at tað er krevjandi at byggja vegir, men eg skilji ikki, hví tað skal gerast uppá tann mest tvørliga máta hvørja einastu ferð.

Og tú hugsar kanska og spyr: Hví fara tit ikki í tok í staðin. Gloym tað. Í Norra steðga tokini ikki longur uttan í størri býunum, og einki bussamband er út til tey smærru plássini har færri enn 10.000 fólk búgva. Har vit skulu búgva 7.000 fólk.



# Kæra um lendi til hestafjós á Norðoyri

**Birni Hansen, bóndi, hevur saman við umboðum fyri Norðoya Rossafelag kært eina avgerð hjá Matrikulstovuni til Vinnumálaráðið**

KÆRA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bóndin, Birni Hansen á Norðoyri og Norðoya Rossafelag, eru ikki nøgd við eina avgerð, sum Matrikulstovan hevur tikið. Málið er tískil endað sum kæra hjá Vinnumálaráðnum í høvuðsstaðnum. Men í Vinnumálaráðnum hava tey eftir øllum at døma góðar stundir, tí enn er einki svar komið haðani, hóast kæran varð send, 12. mai í ár.



*Norðoya Rossafelag bíðar eftir svari úr Vinnumálaráðnum, og meðan bíðað verður, bíðar eisini ætlaða byggingin av einum rossafjósi á Norðoyri*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

### Søgan aftanfyri

Tað var í juni mánaða 2002, at Birni Hansen, sum eigur jørð á Norðoyri, søkti um loyvi at býta umleið 2500 fermetrar frá einum matrikulnummari, hann eigur á Norðoyri. Matrikulnummarið er tilsamans 6.854 fermetrar til støddar og er í byggisamtyktini lagt út til landbúnaðarendamál.

Endamálið við sundurbýtinum er at selja frábýtta økið til Norðoya Rossafelag, sum ætlar sær at byggja eitt hestafjós á Norðoyri.

Klaksvíkar býráð hevur viðmælt umsóknini, og ætlaða byggingin er góðkend av friðingarmyndugleikunum.

Men Matrikulstovan hevur lagt seg í buktina og vil ikki geva loyvi til sundurbýti.

Í svari, dagfest 23. oktober 2002, uppá umsókn um sundurbýti, sigur Matrikulstovan, at hon ikki kann ganga umsóknini á møti, tí matrikuleringslógin ikki heimilar sundurbýti av landbúnaðarjørð í smærri brúk - uttan til samanleggingar við aðra búnaðarjørð ella grundstykki, almenna nýtslu v.m. Somuleiðis sigur stovnurin, at sundurbýti kann bert fara fram, um hetta er í samsvar við galdandi byggisamtykt.

### Undantaksloyvi

Í kæruni, sum eigarin av lendinum saman við umboðum fyri Norðoya Rossafelag, hava sent Vinnumálaráðnum, siga tey seg meta, at frábýti av grundøki til hestafjós í landbúnaðarøki er í trá við byggisamtyktina.

- Men Matrikulstovan er eftir øllum at døma ikki samd við okkum í hesum.

Í kæruni søkir bóndin saman við umboðum fyri rossafelagið tískil Vinnumálaráðið um undantaksloyvi til frábýti av jørð til hestafjós á matrikulnummarinum á Norðoyri.

Hjálagt kæruni er viðmæli frá Klaksvíkar býráði, svarskriv frá Matrikulstovuni, skriv sum er sent Friðingarnevndini og loyvi frá Yvirfriðingarnevndini.

### Einki svar

Sosialurin vendi sær til eigaran av lendinum, Birna Hansen og formannin í Norðoya Rossafelag, Ólav Johannesen, gjáramorgunin, men hvørgin teirra hevði enn sæð nakað svar frá Vinnumálaráðnum uppá kæruna, hóast hon dagfest, 12. mai 2003.

# Friendtex í Hæddini leygardagin

**- Eg fari at nýta hetta høvi til tess at gera handilin meira sjónligan, sigur Mathilda Dam Lamhauge**

HANDIL
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag er langur leygardagur hjá handlunum, sum eru við í Handilsmiðdeplinum í Runavíkar kommunu.

Í samband við langa leygardagin, fer handilin, Friendtex, sum síðan mars í ár hevur húsast á Leitisvegi 109 í Saltangará, at sýna fram sínar vørur í fundarhølunum hjá arbeiðarafelagnum, Hæddini.



*Í dag fer Friendtex-handilin við Leitisvegin at sýna fram sínar vørur í hølunum hjá Hæddini í Saltangará*

### Meira sjónligur

Mathilda Dam Lamhauge, sum eigur og rekur Friendtex-handilin í Saltangará, sigur, at hon fer at sýna fram allar sínar vørur, sum í fyrsta lagi eru konufólkaklæði og skógvar.

- Eg fari at nýta hetta høvi til tess at gera handilin, sum annars liggur eitt sindur avsíðis, meira kendan og sjónligan millum fólk.

Við sær hevur hon bæði heit vetrarklæði og góð klæði til tey, sum skulu pynta seg til eitt hvørt høvi.

- Alt er av kenda og umtókta merkinum, Friendtex, sigur hon.

### Mannfólkaklæði

Mathilda Dam Lamhauge vísir á, at hon eisini selir mannfólkaklæði, men hesi verða bíløgd so hvørt – og eru ikki á goymslu.

- Tað tekur eina til tvær vikur at fáa bíløgdu mannfólkaklæði heim, sigur hon.

Opið verður í Hæddini í dag frá kl. 10-17.

Handilin við Leitisvegin er vanliga opin frá kl. 15.00-17.30, men annars kunnu fólk síggja vørurnar eftir avtalu við at ringja á tlf. 449996/224087.

# Flytir fisk fyri Skipafelag Føroya

**Tað var á einum túri heim úr Íslandi, at fleiri tons av kjøti fórust við hesum skipinum**

FLUTNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fríggjadagin lá gamli íslendski trolarin, Ernir, í Saltangará. Skipið siglir hvørt mánakvøld úr Føroyum við feskum fiski fyri Skipafelag Føroya niður til Scrabster í Skotlandi. Millum túrarnar verður av og á eisini farið til Íslands við fiski og heimaftur við øðrum vørum, men fiskamarknaðurin í Íslandi hevur ikki verið nakað serligur í seinastuni. Tískil hevur heldur eingin flutningur verið hagar í eina tíð.



*Gamli íslendski trolarin, Ernir, sum siglir fyri Skipafelag Føroya. Tað var umborð á hesum skipinum, at fleiri tons av kjøti endaðu sínar dagar á brennistøðini á Sandvíkarhjalla*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Kjøtlastin

Tað var júst á einum slíkum túri heim úr Íslandi, at fleiri tons av íslendskum seyðakjøti endaðu á brennistøðini á Sandvíkarhjalla, tí kuldin í skipinum sambært heilsufrøðiligu krøvunum hevði verið ov lágur.

Her var eingin góða mamma, tí kjøt, sum liggur fryst undir tilmálda kuldamarkinum, kann ikki seljast.

Ivamál er um, hvørt kuldin í skipinum hevur verið ov lágur longu, tá ið skipið fór úr Íslandi við seyðakjøtinum. Kønir ivast í, um kuldin kundi fella so nógv á stuttu leiðini til Føroya.

Ernir hevur siglt eitt ár ella so fyri Skipafelag Føroya. Skipið hevur kølilast umframt tvær bingjur á dekkinum, ið eisini verða nýttar sum last.

Skipið lastar eini 100 tons netto.